Skrivlig prótvøka, 10. FLOKKUR
Mai-juni 2010
FØROYSKT



Mynd av alnótini

4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 Snildi Pætur (síða 2)

2 Framtíðardreymar (síða 3)

3 Vestur fyri lívið (síða 4-5)

4 Hjálp og neyðhjálp (síða 6-7)

5 Sjónarmið (síða 8)

1 Snildi Pætur

- Greið frá høvuðssjónarmiðunum í tekstinum og vís á boðskapin
- Sig tína hugsan um evnið
- Ger yvirskrift

"Ná, kæri Pætur," segði Klædna-Múllar. "Nú manst tú hava funnið mær okkurt lítið snildi, veit eg."

"Ja," segði Pætur. "Men ikki eru tað smá snildi, men eini heilt framúrskarandi risasnildi. Tey fara ikki at kosta undir 10.000 krónur."

"Nú so!" segði Klædna-Múllar. "Tað munnu vera vorðið sum snildi. Lat meg hoyra. Eg eri so spentur: Hvat skal eg gera, sigur tú?"

"Sært tú," segði Pætur. "Lat okkum tosa eitt sindur um tað. Hvussu leingi halda einar buksur?"

Klædna-Múllar hevði sett seg í ein stól. Hann hevði lagt beinini á kross. Hann sat og dandaði við fótunum. So hugdi hann at teimum stríputu buksunum og segði:

"Hmmm, hvat skulu vit siga? Einar buksur sum hesar halda eini fimm ár. Og um tær bert verða brúktar til stás, halda tær nógv longur."

"Og halda kjólarnir hjá gentunum líka leingi?" segði Pætur.

"Ja," segði Klædna-Múllar. "Tíverri. Satt at siga líkist tað ongum. Hvat skal eg gera?"

"Tú skalt lata verksmiðjurnar gera buksur við smølum brókum. Tað skal vera loyniligt, eingin skal fáa tað at vita."

"Áá, sum tað er spennandi!" Segði Klædna-Múllar. "Og hvat so?"

"Jú, ímeðan skalt tú selja vanligar buksur. Og tá tú ikki hevur fleiri vanligar buksur, skal tú seta stórar lýsingar í bløðini. Har skal standa: Í ár skulu allar buksur hava smalar brøkur! Vanligar buksur eru ljótar!"

Klædna-Múllar var heilt fjálturstungin. Hann hugdi at teimum fínu buksunum hjá sær.

"Hvat er tað, tú sigur Pætur," segði hann.

"Hatta var ljótt sagt. Eg eri í vanligum buksum, og tær eru alt annað enn ljótar."

"Sjálvandi," segði Pætur. "Tú skalt fáa fólk at halda, at vanligar buksur eru ljótar. So tveita tey tær vanligu buksurnar burtur og keypa nýggjar við smølum brókum.

"Hygga síggj," segði Klædna-Múllar. "Nú skilji eg!"

Men Pætur var ikki liðugur at siga frá sínum snildi. Hetta var bara byrjanin.

"Lurta nú væl," helt Pætur fram. "Meðan fólk keypa buksur við smølum brókum, skulu verksmiðjur tínar fara undir at seyma trompetbuksur! Tá ongar buksur við smølum brókum eru eftir, setir tú nýggjar lýsingar í bløðini. Har skal standa: Í ár brúka øll trompetbuksur! Buksur við smølum brókum eru ljótar!"

"Hygga síggj!" segði Klædna-Múllar.

"So eru fólk noydd at tveita tær gomlu buksurnar við smølum brókum burtur og keypa nýggjar trompetbuksur."

"Heldur tú tað?" segði Klædna-Múllar ekkafullur. "Heldur tú, at fólk tveita óslitin klæði burtur?"

"Sjálvandi!" segði Pætur. "Um klæðini ikki eru nýmótans, so fara fólk at arga øll, sum ikki eru ílatin eftir mótanum. Øll eru bangin fyri at verða argað. Øll fara at keypa mótaklæði."

Nú skilti Klædna-Múllar so smátt, hvussu snild hesi ráðini vóru.

Brot úr bókini "Snildi Pætur", Sven Wernstrøm

2

Framtíðardreymar

Hava øll somu fortreytir at droyma framtíðardreymar?

- Skriva um evnið

Myndir av alnótini

3

Vestur fyri lívið

- Les tekstirnar
- Greið stutt frá innihaldinum
- Sig tína hugsan um, hvønn týdning tað hevur at vera ansin og umhugsin

"Í dag er tað blivið soleiðis, at mótaheimurin og ítróttarheimurin eru farin at ganga meira hond í hond. Tí havi eg sniðgivið ein nýggjan vest, sum bæði er funktionellur og lekkur, kann rullast saman til eina lítla tasku, hann skal ikki niður um høvdið, og hann sæst avbera væl í myrkri."

Guðrun frá G&G

"Ráðið fyri ferðslutrygd hevur saman við Tryggingarfelagnum Føroyar tikið stig til at framleiða ein nýggjan endurskinsvest, sum "Guðrun og Guðrun" hava sniðgivið.
Vestar finnast frammanundan, sum dúgliga verða nýttir, men summi halda ikki hesar vestar vera nóg nýmótans og fara tí ikki í teir."
Ráðið fyri ferðslutrygd minnir á, at hesin vestur er bert eitt ískoyti til meginregluna um at vera í ljósum klæðum og nýta endurskin ta myrku tíðina.

Sølvi Reinert Hansen, RFF

Mynd av heimasíðuni hjá www.rff.fo

Royn at vera fiksur í einum koyristóli

Eg hevði verið í dansi við vinfólkum. Út á náttina var eg troytt og fór heim. Eg súkklaði, men eg minnist ikki annað enn, at eg súkklaði góðar 200 metrar.
24 ára gamla Súsanna heldur fyrilestur fyri einum 10. flokki, og vit eru hjástødd.
- Eg vaknaði 3 dagar seinni í eini song á sjúkrahúsinum. Foreldur míni sótu undir liðini á mær. Tá ið eg spurdi, hvat ið hent var, søgdu tey, at ein bilur hevði rent á meg aftaníframá, og at ryggurin var brotin. Um tað mundið skilti eg ikki, hvat hetta merkti - eg var einans 16 ára gomul. Eg minnist, at eg spurdi, hvar beinini vóru. "Tey eru har, tey skulu vera", segði pápi og tók dýnuna oman av mær. Eg føldi ikki beinini.
Næmingarnir í 10. flokki sita stillir í stólunum. Einstakir dreingir taka um beinini, hugsa sær, at Súsanna situr ónervað í koyristólinum og sigur frá vanlukkuni, ið henni var fyri fyri átta árum síðan, og sum gjørdi, at hon ongantíð fer at ganga aftur. Kenslur fær hon ongantíð aftur í beinini.
- Eg havi tó lært at liva við brekinum, og eg eri ikki so hørm longur. Satt at siga eri eg í dag ein eydnusom menniskja.
10. flokkur hyggur undrandi - hvussu kann ein, sum situr í koyristóli, vera eydnusamur?
Tað tekur tíð, áðrenn tú kemur teg so mikið eftir slíka vanlukku, at tú kanst ferðast kring landið og halda fyrilestrar. Súsanna stríddist við nýggju umstøðurnar.
- Stutt eftir at eg varð innløgd, søgdu læknarnir, at útlitini at koma at ganga aftur vóru 80%, men 14 dagar seinni segði ein annar lækni:

"Tíverri Súsanna, tú fert ongantíð aftur at ganga"

- Tá var als eingin vón. Hugsi tykkum. Eg var 16 ára gomul, íðkaði nógvan ítrótt, serliga handbólt, og eg var júst farin at ganga í dans og fjasast við dreingir. Brádliga fekk eg boðini um, at eg mátti sleppa øllum hesum. Alt var endað, áðrenn tað veruliga var byrjað. Tað vóru hørð boð. Eg hevði ilt við at ímynda mær, at eg fór at finna mær ein drong, ið skoytti um meg. Tað er ikki bara at siga tað at síggja gott út, tá ið tú situr í koyristóli. Vanliga lótu vit okkum í buksur, ið sótu væl um reyvina, men reyvina ber eingin eyga við, tá ið tú situr í koyristóli.

- Ringast var tó, at allir dreymarnir um ein framtíð fánaðu burtur. Øll menniskju ímynda sær, hvussu framtíð teirra skal verða: útbúgving, arbeiði osfr. Við eitt hevði eg onga framtíð. Mong ár liðu, áðrenn eg aftur hugsaði um framtíðina - hóast eg eri avlamin.

Mynd av heimasíðuni hjá www.rff.fo

Tekstur úr serblaðnum "Síðsta skríggj" - eitt blað um UNG & FERÐSLU, Dimmalætting 1998

4

Hjálp og neyðhjálp

- Les tekstirnar
- Greið frá teimum sjónarmiðum, sum eru í tekstinum
- Sig tína hugsan um evnið

Meðan hjálparfólk í túsundatali stríðast við at bjarga neyðstøddum í haitiska høvuðsstaðnum Port-au-Prince, liggja útlendsk ferðafólk og sóla sær á einari strond har norðuri í landinum einar 100 kilometrar frá býnum. Tað skrivar bretska blaðið The Guardian.

Ferðafólkini, sum eru meiri enn 4.300 í tali, komu við ferðamannaskipinum Independence of the Seas fríggjadagin, og eitt annað skip hjá sama reiðaríi er á veg hagar, skrivar The Guardian.

Fleiri halda, at reiðaríið átti at broytt ferðaætlanina, so skipini kundu farið til okkurt annað land enn Haiti, nú fólk í túsundatali hava latið lív av jarðskjálvtanum har, skrivar tað bretska blaðið.

Portalurin 19. januar 2010

Heimasíðan skrivar, at Freedom of the Seas fór úr Port Canaveral í Florida sunnudagin við kós móti Haiti. Skipið kom í fokus í amerikanskum fjølmiðlum, tí felagið, sum eigur skipið, ikki vildi avlýsa túrin, sum var planlagdur við ferðafólki til Haiti.
Reiðaríið grundgav við, at umframt at skipið hevði stóra last av neyðhjálp, so vóru tey mongu ferðafólkini við til at hjálpa fíggjarstøðuni hjá lokalsamfelagnum.
- Vit fara at hjálpa fólki í túsundatali og vónandi at bjarga mongum mannalívum, varð starvsfólka-skiparin, Meinhard Hansen, siteraður at siga á amerikonsku heimasíðuni.
- Hóast summi halda tað verða óðamannaverk at senda ferðafólk til neyðstadda økið, so leggja vit at bryggju í Labadee, sum er 60 fjóðringar frá Port-au-Prince, sum er hart raktur av jarðskjálvt-unum. Henda havnin hevur ikki fingið skaða, og um vit valdu at avlýsa túrin, hevði tað rakt fíggjarstøðuna í økinum sera meint, varð Meinhardt Hansen siteraður fyri at siga við heimasíðuna hjá amerikansku sjónvarpsrásini.
Umframt at sigla ókeypis við neyðhjálp hevur reiðarríðið latið peningaligan stuðul – eina millión dollarar - til vanlukkuøkið.

PS. Reiðaríið eigur fleiri skip, sum sigla til Labadee í Haiti *Norðlýsið 1. februar 2010*



1. Kom út og renn, og stuðla samstundis Haiti!

2. Tónleikarar spæla fyri Haiti.

3. Skótar í Føroyum hjálpa nú skótum á Haiti at hjálpa. Teir umleið 30.000 skótarnir á Haiti eru sera virknir, og vit veita teimum nú eina hjálpandi hond, sigur Jan á Argjaboða

4. Uttanríkisráðið hevur gjørt av at lata 150.000 kr. í neyðhjálp til Haiti, sum er rakt av hørðum jarðskjálvta.

5. Føroysku Lionsklubbarnir hava samtykt at lata kr. 25.000,00 kr í hjálp til tey neyðstøddu á Haiti.

Myndir av alnótini

5

Sjónarmið

- Les tekstin
- Hvørji sjónarmið umboðar teksturin
- Sig tína hugsan um hesi sjónarmið

Tað "serliga" við seruppgávuni var, at lærarin noyddi meg at lesa hana upp fyri flokkinum. Eg noyddist at vísa myndirnar eisini. Tað var í bestu meining, men longu í næsta fríkorteri fóru nakrar av gentunum at kalla meg "Lítli Einstein". Tað eru tær somu genturnar, ið eru tær ídnastu at royna seg við eygnasmyrsli og varrastiftum. Eg hugsi, at tær royna seg við nógvum øðrum eisini.

Eg havi einki ímóti eygnasmyrsli og varrastiftum. Men vit eru á einari gongustjørnu í alheiminum. Eg haldi, tað er ørt at hugsa um. Tað er í heila tikið løgið at hugsa um, at ein alheimur er til. Men tað eru eisini gentur, ið ikki eru førar fyri at síggja henda alheimin fyri berari eygnasvertu. So eru eisini dreingir, ið ikki eru førir fyri at hyggja út um sjónarringin fyri einum fótbólti. Tað er, ið hvussu er ein fittur teinur at ganga frá einum lítlum sminkuspegli til ein stóran speglstjørnukikara. Eg haldi, at tað er tað, ið kallast "sjónarmiðsumskaring". Kanska kann tað eisini rópast ein "áááuppliving". Tað er ongantíð ov seint at fáa eina áááuppliving. Men nógv fólk liva alt lívið og vita ikki av, at tey sveima í einum tómrúmi. Tað er ov nógv, ið hálar í teg her niðri á jørðini. Tað er nóg mikið at hugsa um, hvussu tú tekur teg út.

Vit hoyra heima á hesi klótuni. Tað ætli eg mær ikki at seta spurnartekn við. Vit eru ein partur av náttúrunnar lívi á hesi gongustjørnuni. Her hava apukattar og skriðdjór lært okkum, hvussu vit nøra okkum, og eg havi einki at mótmæla. Í eini aðrari náttúru hevði kanska alt verið øðrvísi. Men her eru vit. Og eg endurtaki: Eg avnokti tað ikki. Tað, eg meini, er bara, at tað ikki nýtist at forða okkum í at gera okkum ómak og hyggja eitt lítið sindur longri enn fram um nøsina.

Brot úr bókini "Appelsingentan", Jostein Gaarder



Myndir av alnótini

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 785